Bjørg Hentze

Fra: Bárður Atlason Ísheim <bardur@megd.fo>
Sendt: 14. februar 2023 09:08
Til: Fíggjarmálaráðið
Cc: Marjun Jacobsen
Emne: VS: Fw: Til hoyringar - Uppskot til løgtingslóg um Mínboks

Til Fíggjarmálaráðið,

Deyvafelag Føroya hevur nakrar viðmerkingar til uppskotið til løgtingslóg um Mínboks. Sí niðanfyri.

Vh. Bárður

Fra: deyvaradgevin@deaf.fo <deyvaradgevin@deaf.fo>
Sendt: 13. februar 2023 09:39
Til: megd <megd@megd.fo>
Emne: Re: Fw: Til hoyringar - Uppskot til løgtingslóg um Mínboks

Hoyringssvar til uppskot um

§ 8. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um nýtslu av almennu talgildu postskipanini, undir hesum teknisk krøv umframt støddd og tal av fílum, sum í mesta lagi kunnu sendast í hvørjari sending:

Deyvafelag Føroya ynskir at allar skrivaðar vegleiðingar í "Mínboks" verður týddur til føroyskt teknmál og lagdur út sum filmur , soleiðis at teknmælt kunnu fáa somu vegleiðingar sum tey, ið lesa tekst. Í øðrum lagi ynskir Deyvafelag Føroya at ein " lætt lesilig" útgáva av teksti/vegleiðingum, verður atkomulig til teir brúkarar, ið hava tørv á tí.

Vinarliga

Vegna Deyvafelag Føroya

Vinaliga

Christina Johannessen
Deyvaráðgevi
Deyvafelag Føroya
Íslandsvegur 10b
Postsmoga 48
FO-110 Tórshavn
Telefon - sms 215324
deyvaradgevin@deaf.fo

----- Original Message -----

From: Deaf (deaf@deaf.fo)

Date: 02/01/23 16:14

To: deyvaradgevin@deaf.fo

Subject: **Fw: Til hoyringar - Uppskot til løgtingslóg um Mínboks**

Vinarliga

Ingibjørg Jacobsen
Dagligur leiðari
Deyvafelag Føroya
Íslandsvegur 10B
100 Tórshavn
telefon - sms 287597

deaf@deaf.fo

Vinaliga

From: Bárður Atlason Ísheim (bardur@megd.fo)

Date: 01/17/23 15:34

Subject: **Til hoyringar - Uppskot til løgtingslóg um Mínboks**

Góðu limafeløg,

MEGD hevur fingið viðhefta uppskot til løgtingslóg um Mínbokstil ummælis frá Fíggjarmálaráðnum.

Uppskotið verður lýst soleiðis:

Mínboks hevur meiri enn 10 ár á baki og lýkur krøv um trygt talgilt samskifti, eisini í mun til dáturverndarlógina. Gjaldstovan yvirtók Mínboks í 2018 í sambandi við arbeiðið hjá Talgildu Føroyum og er Mínboks í dag ein sameindur partur av Vanganum. Mínboks lýkur ásetingar og standardar um talgilda atkomu, sum tryggjar, at so nógv sum møguligt fáa atgongd til postkassan.

Postur sum í dag verður sendur gjøgnum talgildu skipanina hevur tó ikki somu rættarligu støðu sum postur, ið verður sendur við pappíri og brævbjálva. Endamálið við lógaruppskotinum er at javnseta "vanligan" post við talgildan post, soleiðis at t.d. kunning millum stovn og borgara hevur somu rættarligu støðu, óansæð um hendan kunningin er talgild við

Mínboks ella ikki. Lógarbroytingin er ein liður í arbeiðinum at gera samskiftið millum almennar stovnar og borgarar meira tíðarhóskandi og smidligt.

Borgarar skulu trygt kunna samskifta talgilt við almennar stovnar. Tí verður ásett sum krav, at almennir stovnar skulu samskifta umvegis Mínboks, tá ið viðkvæmar persónsupplýsingar ella trúnaðarupplýsingar verða sendir talgilt. Tað ber framhaldandi eisini til at senda slíkar upplýsingar við vanligum posti.

Fyri at rita inn á Mínboks, skulu borgarar hava Samleikan. Borgarar yvir 13 ár kunnu fáa Samleikan. Í dag eru 33.700 fólk eru skrásett sum brúkarar í Mínboks.

Tey feløg, ið ynskja at vera við í hoyringarskrivinum frá MEGD, eru vælkomin at senda uppskot til broytingar ella viðmerkingar til mín í seinasta lagi**mánadagin 13. februar kl. 12:00**. Eisini eru tit vælkomin at ringja til mín á tlf. 527373.

Uppskotið er til hoyringar á hoyringsportalinum hjá Landsstýrinum fram til 13. februar 2023 og limafeløg hava eisini møguleika at senda egnar viðmerkingar beinleiðis tilfmr@fmr.fo í seinasta lagi 13. februar 2023.

Vinarliga

Bárður Atlason Ísheim

Aðalskrivari

MEGD

Íslandsvegur 10C

FO-100 Tórshavn

bardur@megd.fo

Tlf. +298 527373

www.megd.fo